# Atlantsflog økir um tyrluflotan

**Atlantic Helicopters – tyrlutænastan hjá Atlantic Airways – hevur keypt eina tyrlu av slagnum Bell 412 fyri 24 milliónir krónur. Felagið hevur nú tríggar tyrlur og seks flogfør**

FLOGFERÐSLA
*Eirikur Lindenskiov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Nýggjasta tyrlan hjá Atlantsflog av av slagnum Bell 412. Hon er keypt úr Tjekkia, har løgreglan ehvur havt hana undir hond síðani 1993*

Tyrlutænastan hjá Atlantic Airways - sum eisini kallast Atlantic Helicopters - økir um tyrluflotan. Felagið hevur í farnu viku keypt eina tyrlu fyri slakar 24 milliónir krónur. Talan er um eina Bell 412 tyrlu, sum tjekkiska løgreglan hevur havt undir hond síðani 1993. Tyrlan hevur einans flogið 4700 tímar og er tí lutfalsliga lítið brúkt hesi árini. Nýggja tyrlan er av sama slagi, sum tann felagið keypti til leiting og bjarging fyri nøkrum árum síðani.

- Atlantic Helicopters hevur brynjað seg við hesi tyrluni afturat, so felagið er betur ført fyri at taka við avbjóðingum í frálandavinnuni, har stórur eftirspurningur er eftir tyrlum í løtuni, sigur Magni Arge, stjóri. Í Føroyum flýgur Atlantic Helicopters fyri Statoil í samband við boringina á Brugduøkinum. Samstarvið við Statoil fevnir bæði um flutning millum Norra og Føroyar, flutning millum Føroyar og boripallin Stena Don og SAR tænastu.

- Samstarvið við Statoil og onnur oljufeløg hevur stóran týdning, tí tað menn-ir førleikan hjá føroyska felagnum og hevur medvirkað til at skapa áhuga fyri føroyskum tænastum eisini uttanfyri landoddarnar, sigur stjórin í føroyska flogfelagnum. Eitt nú hava seismikkskip eisini tørv á tyrluflutningi, og samstarvið við hesi feløg hevur elvt til vaksandi virksemi uttanfyri landoddarnar.

Í summar hevur Atlantic Helcopters flogið manningar út á seismikkskip úr Vágum, Aberdeen, Stornoway og Sumburgh.

Nýggja tyrlan stendur í løtuni hjá Air Alpha í Odense, har hon skal tillagast off-shore flúgving og fáa nýggjar motorar ísettar. Tyrlan fer í rakstur seinni í ár. Umframt at røkja bygdaflúgving og offshoreflúgving, fer hon eisini at egna seg stak væl sum tilatakstyrla fyri bjargingartyrluna. Hon er sama slag og eitt nú FLIR (Forward Looking Infra Red) leitiútgerð kann lættliga setast í hana. Hesa útgerð kann gamla Bell 212 tyrlan ikki bera.

Felagið hevur enn ikki gjørt av, hvørt Bell 212 tyrlan - sum nýliga er yvirhálað - skal seljast ella leigast út, tá nýggja tyrlan er tøk. Fyrispurningar eru eisini um hesa tyrluna, sigur Magni Arge, men fyribils bíða vit við eini avgerð, til vit kenna úrslitið frá boringini í ár, sigur hann.

Við nýggju tyrluni gtelir flotin hjá Atlantic Airways tríggjar Bell 212/412 tyrlur og seks BAe 146/RJ100 flogfør.

# 10 oktober: Altjóða dagur móti deyðarevsing.

**Týsdagin 10. oktober er altjóða dagur móti deyðarevsing. Samtakið "World Coalition against Death Penalty" (WCADP), har Amnesty International er limur, skipar á hvørjum ári fyri tiltøkum 10. oktober, við tí endamáli at avtaka deyðarevsing. Í ár verður ljós varpa á órættvísi í sambandi við deyðarevsing undir heitinum "The Death Penalty: A Failure of justice".**

*Amnesty International, Føroya deild skipar í hesum sambandi fyri almennum tiltaki um deyðarevsing á Margarinfabrikkini týskvøldið 10. oktober kl 19.30. Á skránni verður filmur og framløga um evnið, við serligum atliti til deyðarevsing í USA. Tiltakið er ókeypis og øll eru vælkomin. Sí nærri skrá á heimasíðuni*
www.amnesty.fo

Tilvild, rasisma og mismunur í rættarskipanini

Amnesty International og WCADP varpa í ár ljós á hvussu tilvild, rasisma og mismunur í kinesisku, iransku, nigeriansku, saudi arabisku og amerikansku rættarskipanini ávirka úrskurðin hjá dómaranum.

Amnesty International og WCADP eru av tí fatan, at deyðarevsing er ein grim, ómenniskjalig og niðurgerandi revsing. Harafturat er vandin fyri, at ósek fólk verða tikin av lívi altíð til staðar.

Sambært tølum hjá Amnesty International vóru í minsta lagi 2148 fólk avrættaði í 2005 og 5186 fólk vóru dømd til deyðis. Hesi hagtøl eru bert toppurin av ísfjallinum. Deyðarevsing fer í nógvum londum fram í loyndum, og veruligu tølini verða ikki skrásett. Tað eru nøkur fá lond, sum standa fyri største partinum av avrættingunum, sum vera framdar í dag. Kina, Iran, Saudi Arabia og USA standa fyri 94 prosentum av øllum avrættingunum, sum fóru fram í 2005. Avrættingarnar fóru fram við skjóting, hálshøgging, heinging, steining og deyðiligari innsprænging.




### Orsøkir til deyðarevsing

Dráp, stuldur, skøkjuhald, "hooliganisma", neyðtøka, ólógligur handil, skattasvik og fíggjarsvik eru millum 68 brotsverkini, ið kunnu viðføra deyðarevsing í Kina. Iran avrættaði síðsta ár átta børn og ung, sum vóru undir 18 ár, tá brotsverkið varð framt. Í bæði Iran og Saudi Arabia kann man verða avrættaður fyri at vera kristin ella samkyndur. Ótrúskapur og kynslig samvera uttanfyri hjúnarlag kunnu somuleiðis føra til deyðarevsing. Í USA verða fólk avrættaði fyri manndráp. Tað eru fleiri dømi um, at sálarliga sjúk fólk og menningartarnaði fólk eru avrættaði.

At fólk verða avrættaði á slíkum grundarlagi, ger strídið móti deyðarevsing meira átrokandi.

### 129 lond uttan deyðarevsing

Amnesty International fegnast kortini um tey framstig, sum eru á økinum. Síðani 1977, tá Amnesty International fór undir altjóða átakið móti deyðarevsing, hava 70 lond avtikið deyðarevsing. Tað eru sostatt 129 lond, sum ikki nýta deyðarevsing longur.

Til ber at lesa meira á www.amnesty.fo og á www.worldcoalition.org